# Ársfrásøgn

fyri tíðina 01.01.15 - 31.12.15



Print: Føroya Prent · Sett upp: Heidi Gásadal

Arbeiðsloysisskipanin · Postsmoga 3022 · FO-110 Tórshavn
Tel 349550 · Fax 349551 · als@als.fo · www.als.fo

WWW.ALS.FO

# Upplýsingar um skipanina

**Arbeiðsloysisskipanin**
Tinghúsvegur 14
FO 100 Tórshavn
Telefon: 349550
Telefax: 349551
Heimasíða: www.als.fo
Roknskaparár: 01.01- 31.12

**STÝRIÐ**
Eyðfinnur Jacobsen, formaður
Georg Hansen
Herálvur Joensen
Magnus Pauli Glerfoss
Marita Rasmussen
Óluva í Gong
Snorri Fjallsbak

**STJÓRN**
Magni á Deild Olsen, stjóri

**GRANNSKOÐAN**
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

# Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um skipanina v.m. .......... **2**
Leiðsluátekning .......... **4**
Átekning frá óheftum grannskoðara .......... **5**
Høvuðs- og lyklatøl .......... **6-7**
Frágreiðing frá leiðslu .......... **8-25**
Rakstrarroknskapur .......... **26**
Fíggjarstøða .......... **27**
Pengastreymsuppgerð .......... **28**
Nýttur roknskaparháttur .......... **29-30**
Notur til ársfrásøgnina .......... **31**

## Leiðsluátekning

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 1. januar - 31. desember 2015 hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Stjórnin og stýrið meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu grunsins tann 31. desember 2015 umframt av úrsliti og peningastreymum grunsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2015.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur eftir okkara fatan eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

*Tórshavn, tann 12. mai 2016*

**Stjórn**

**Magni á Deild Olsen**
stjóri

**Stýrið**

**Eyðfinnur Jacobsen**
stýrisformaður

**Magnus Pauli Glerfoss** | **Marita Rasmussen** | **Óluva í Gong**

**Snorri Fjallsbak** | **Georg Hansen** | **Herálvur Joensen**

## Váttanir frá óheftum grannskoðara

### TIL LEIÐSLUNA Í ARBEIÐSLOYSISSKIPANINI

### Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2015 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymsuppgerð og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Ein grannskoðan ber eisini í sær, at mett verður, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2015 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi grunsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2015 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava, sum ásett í ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

*Tórshavn, tann 12 mai 2016*

SPEKT
Løggildir grannskoðarar Sp/f

**Jóhannes Færø**
Statsaut. revisor

## Høvuðstøl

| Upphædd í tkr. | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Úrslit** | | | | | |
| Inngjøld | 202.206 | 189.882 | 183.489 | 180.540 | 141.946 |
| Bruttoúrslit | 61.928 | 14.190 | -20.603 | -71.560 | -174.731 |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 45.303 | -3.847 | -38.435 | -89.475 | -188.456 |
| Úrslit frá fíggjarpostum | 5.221 | 11.262 | 11.774 | 15.039 | 2.275 |
| Ársúrslit | 49.025 | 5.518 | -28.520 | -77.096 | -189.320 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavnvág | 369.473 | 323.682 | 317.344 | 345.483 | 435.133 |
| Eginogn | 361.424 | 312.398 | 306.881 | 335.402 | 412.498 |
| **Pengastreymar** | | | | | |
| Pengastreymar: Rakstri | 50.927 | 2.063 | -25.793 | -87.252 | -175.126 |

## Lyklatøl

| | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Soliditetur** | | | | | |
| Tryggleikastig | 97,8% | 96,5% | 96,7% | 97,1% | 94,8% |
| **Annað** | | | | | |
| Ársverk í miðal | 43 | 39 | 34 | 29 | 25 |



# Frágreiðing frá leiðslu

Aftur í 2015 minkaði arbeiðsloysið, og fyri alt árið var árstíðarjavnaða arbeiðsloysið á leið 2,9%. Hetta er lægsta arbeiðsloysið, sum hevur verið hesi sjey árini síðani 2008, tá miðalarbeiðsloysið fyri alt árið var 1,3%.

Metlága arbeiðsloysið sæst aftur í fíggjarligu viðurskiftunum hjá Arbeiðsloysisskipanini. Samlaða útgjaldið í 2015 var 133 mió. krónur, sum eisini er tað lægsta síðani 2008, og ársúrslitið gjørdist eitt avlop á hálvthundrað mió. krónur. Samanborið við árið fyri er ársúrslitið meiri enn nýggjufaldað, og Arbeiðsloysisskipanin er við hesum aftur á røttu kós, og tað ber til at konsolidera skipanina fíggjarliga.

Tað er umráðandi, at tað ber til at styrkja skipanina fíggjarliga í tíðum, tá arbeiðsloysið er so lágt, sum tað hevur verið seinastu 2-3 árini, tí tá tíðirnar aftur fara at skifta, og arbeiðsloysið fer at vaksa, má skipanin vera so mikið væl fyri, at hon megnar at tryggja teimum, ið einki arbeiði hava, nøktandi inntøku.

Hóast úrslitið í 2015 var munandi betri enn árið fyri, so hevði verið ynskiligt, at úrslitið var millum 5 og 10 mió. krónur betri, havandi í huga, at arbeiðsloysið var metlágt, og tí miðjað verður ímóti, at skipanin skal javnviga fíggjarliga, tá arbeiðsloysið er millum 4,25% og 4,50%. Hetta markið hevur støði í søguliga arbeiðsloysinum, og stýrið fyri ALS hevur sett sær fyri, at tá arbeiðsloysið er niðanfyri 4,25-4,50%, skal skipanin hava avlop, meðan hon hevur hall, tá arbeiðsloysið fer upp um 4,5%.

Broytingar vórðu gjørdar í skipanini í 2015, har millum annað inngjaldsloftið varð hækkað, eins og aðrar broytingar eisini vórðu framdar, og so hvørt hesar broytingar fáa fullan virkna, fer úrslitið hjá Arbeiðsloysisskipanini eisini at verða betri, og skipanin fer at verða betri før fyri at standa ímóti vaksandi arbeiðsloysi, tá tað einaferð fer at koma.

## Minkandi arbeiðsloysi

Arbeiðsloysið var í hæddini í nýggjari tíð í 2011, tá tað kom upp á 7%. Síðani hevur tað verið støðugt fallandi, og miðal arbeiðsloysið í 2015 var á leið 2,9%.

Við tí arbeiðsstyrkini, sum er í løtuni, svarar eitt arbeiðsloysi á 2,9% til, at sløk 800 fólk vóru fulltíðararbeiðsleys. Av teimum fingu í miðal 638 fólk arbeiðsloysisstuðul frá ALS. Tey, sum ikki fingu arbeiðsloysisstuðul frá ALS, fingu vanliga forsorg vegna arbeiðsloysi frá Almannaverkinum.

Heldur gongdin í 2015 fram í 2016, og eingin óvanligur skelkur verður í føroyska búskapinum, so er sannlíkt, at arbeiðsloysið verður uppaftur lægri í 2016.

## Gongdin í 2015

Eins og undanfarna ár minkaði arbeiðsloysið rættiliga støðugt í 2015, men tó var ein lítil vøkstur í juli og august mánaði. Júst hvør orsøkin var til hetta er ógreitt, tí vanliga plagar arbeiðsloysið at minka serliga í august, tá fólk fara at nema sær útbúgving.

Tá árið byrjaði, var arbeiðsloysið 3,3%, og í november 2015 var tað komið niður á 2,4%. Tøl fyri desember eru ikki tøk enn.

## Færri komu í skipanina

Tá arbeiðsloysið minkar, eru tað eyðsæð færri, sum koma í Arbeiðsloysisskipanina, meðan fleiri fara úr henni.

Men hóast arbeiðsloysið yvirhøvur var lágt í 2015, so vóru tað hóast alt rættiliga nógv fólk, sum vóru arbeiðsleys í styttri ella longri tíðarskeið.

Tað vórðu stovnaði samanlagt 1.420 arbeiðsloysi í 2015, meðan 1.717 fólk fóru úr skipanini.

Av hesum eru nøkur, sum hava verið arbeiðsleys í fleiri umførum.

Samanborið við árið fyri vóru 234 færri arbeiðsloysi stovnað í 2015, meðan 155 færri vórðu strikað.



**Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøld – ársmiðal**




**Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøld – 2015**




**Talið av stovnaðum og strikaðum arbeiðsloysum árini 2009 til 2015**



## Føroyar hava lægsta arbeiðsloysið

Samanborið við onnur lond í Evropa, so var arbeiðsloysið í Føroyum við árslok í 2015 annað ár á rað tað lægsta yvirhøvur. Í Noreg, har arbeiðsloysið seinastu árini hevur verið sera lágt og vanliga hevur verið lægri enn í Føroyum, var arbeiðsloysið við árslok í 2015 væl hægri enn í Føroyum, meðan Ísland, sum í fleiri ár hevur havt rættiliga høgt arbeiðsloysi, við árslok í 2015 var tað land í Evropa, sum hevði næstlægst arbeiðsloysi.

## Fleiri løntakarar

Gongdin við minkandi arbeiðsloysi sæst í ávísan mun aftur í talinum av løntakarum, sum hevur verið vaksandi seinastu fýra árini.

Ikki óvæntað er eitt ávíst samsveiggj millum arbeiðsloysið og talið av løntakarum soleiðis, at tá talið av løntakarum veksur, so minkar arbeiðsloysið.

Tað er eisini eitt øvugt samsveiggj millum arbeiðsloysið og nettoflyting soleiðis, at tá arbeiðsloysið minkar, vísir tað seg, at nettoflytingin til Føroyar veksur – og øvugt.

Við árslok í 2015 vóru tað 25.180 løntakarar í Føroyum. Hetta er 740 fleiri enn eitt ár frammanundan.

## Lønargjaldingarnar hækka

Sætta árið á rað hækkaðu samlaðu lønargjaldingarnar í 2015, og komu upp á stívliga 8 mia. krónur, sum er slakar 475 mió. krónur meiri enn í 2014, svarandi til ein vøkstur á 6,3%.

Lønargjaldingarnar fyrsta ársfjórðing í 2016 vóru 8,8% hægri enn sama ársfjórðing árið fyri, so tekin eru um, at vøksturin í samlaðu lønargjaldingunum heldur fram í 2016.

## Fólk steðga styttri hjá ALS

Hesi seinastu árini frá 2009 til 2013 hava víst, at fólk, sum einki arbeiði hava havt, hava verið longri og longri arbeiðsleys. Tey fólkini, sum fóru úr skipan-

**Arbeiðsloysið í mun til onnur lond**






**Tal av løntakarum í 2015**




**Lønargjaldingar árini 2000-2015**



ini í 2013, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 254 kalendaradagar.

Tann gongdin vendi í 2014, tá fólk fyri fyrstu ferð í fimm ár steðgaðu styttri í ALS enn undanfarna ár, og henda gongdin helt fram í 2015.

Fólkini, sum fóru úr aftur ALS í 2014, høvdu í miðal steðgað 227 kalendaradagar, meðan tey, sum fóru úr skipanini í 2015, høvdu steðgað í 212 dagar í miðal. Einar tvær vikur styttri enn árið fyri.

Verður hugt eftir, hvussu leingi tey fólkini, sum til eina og hvørja tíð eru í skipanini, hava verið arbeiðsleys, so er myndin tann sama.

Tað vísir seg, at tíðarskeiðini, fólk hava verið arbeiðsleys, eru vorðin alsamt styttri síðani á sumri í 2012 og fram til árslok í 2015.

Tey, sum vóru í skipanini við árslok í 2014, høvdu í miðal steðgað í 250 kalendaradagar, meðan tey, sum vóru í skipanini við árslok 2015, høvdu í miðal verið í ALS í 239 dagar.

Hetta at fólk steðga styttri er sera jaligt, og tað er eitt av aðalmálunum hjá ALS, at fólk fara so skjótt aftur til arbeiðis ella undir útbúgving sum til ber.

Tað hevur eisini stóran búskaparligan týdning fyri ALS, at fólk steðga styttri. Í og við at tey oman fyri 1.700 fólkini, sum eru farin úr skipanini í 2015, í miðal steðgaðu 15 dagar styttri enn tey, sum fóru úr skipanini í 2014, hevur samlaða útgjaldið verið oman fyri 10 mió. lægri, enn tað annars hevði verið.

Myndin omanfyri vísir, at tey, sum eru farin úr skipanini aftur, hava í miðal steðgað styttri enn tey, sum eru í skipanini. Tað kann týðast soleiðis, at tað eru tey feskastu – tey, sum eru vorðin arbeiðsleys síðst – sum fyrst fara aftur til arbeiðis, meðan tey, sum hava verið longri arbeiðsleys, hava truplari við at koma sær aftur til arbeiðis. Ikki tí – munurin er ikki altíð so stórur.

Tølini eru miðaltøl fyri øll tey, sum hava verið í Arbeiðsloysisskipanini, og tað eru eyðsæð stórir munir á, hvussu leingi fólk steðga. Summi – serliga tey ungu – steðga stutt og fara skjótt aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg, meðan tað er ein størri avbjóðing hjá teimum eldru at vinna seg út aftur á arbeiðsmarknaðin.

Hagtølini vísa eisini, at galdandi fyri allar aldursbólkar er tað so, at kvinnurnar hava verið longri arbeiðsleysar enn menninir.

Hóast yvirskipaði boðskapurin er hin sami, so er ein ávísur munur á, hvussu leingi tey, sum eru farin aftur til arbeiðis, hava steðgað, og hvussu leingi tey, sum eru í skipanini, hava steðgað.

Ikki óvæntað er ein rættiliga greiður samanhangur millum generella arbeiðsloysið í Føroyum og longdina á tíðini, fólk eru arbeiðsleys. Tá arbeiðsloysið – mátað sum fulltíðararbeiðsleys í % av samlaðu arbeiðarafjøldini – minkar, so eru fólk yvirhøvur styttri arbeiðsleys. Tað vil siga, at tað ganga færri dagar frá tí, fólk gerast arbeiðsleys, til tey fara úr Arbeiðsloysisskipanini aftur, og tá arbeiðsloysið hækkar, eru fólk longri arbeiðsleys.

### Færri detta út

Sambært reglunum ber til at vera í Arbeiðsloysisskipanini í 648 útgjaldsdagar í eitt fýra ára skeið.

Tað merkir, at tá ein persónur røkkur hesar 648 dagarnar, so kann viðkomandi ikki longur fáa arbeiðsloysisstuðul frá ALS og dettur tí úr skipanini.

Tey trý árini frá 2008 og fram til 2010 vóru tað í miðal á leið 20-30 fólk um árið, sum rukku fullum dagatali og duttu úr skipanini.

Í 2011 vaks talið munandi, og tey trý árini frá 2011 til 2013 var talið á fólkum, sum duttu úr skipanini, árliga millum 100 og 140.

Hóast talið enn var høgt í 2013, so vendi gongdin tá, og talið fór at minka. Í 2014 vóru tað bara 45 fólk, sum duttu úr skipanini vegna fult dagatal, og í 2015 var talið 39.

Hóast talið enn er ov høgt – helst skal eingin detta úr Arbeiðsloysisskipanini, tí tey hava brúkt allar 648 dagarnar – so er at fegnast um, at talið hóast alt er munandi lægri, enn tað hevur verið undanfarnu árini, og tað byrjar nú av álvara at nærkast støðinum frá 2008-2010.

### Snýr seg framvegis um at fara fyrr aftur til arbeiðis

Hóast arbeiðsloysið er metlágt, er tað framvegis greiða sannføringin, at týdningurin av at hava eitt arbeiði at fara til hvønn morgun hevur ovurstóran týdning fyri tey allar flestu.

Tí verður áhaldandi dentur lagdur á at virka fyri, at fólk sum skjótast fara aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg. Eisini fyri at tryggja, at føroyskir arbeiðsgevarar so skjótt og lætt sum til ber fáa starvsfólk við teimum førleikunum, teimum tørvar.

Arbeiðið at knýta tættari sambond við bæði arbeiðsgevarar og við viðskiftafólkini, sum einki arbeiði hava, men sum brennandi ynskja sær at fara aftur til arbeiðis, heldur tí fram. Virkisráðgevararnir hjá ALS gjørdu oman fyri 500 virkisvitjanir í 2015, og úrslitið av teimum vitjanunum var, at fleiri av hesum arbeiðsgevarunum skjótt og lætt fingu nýggj starvsfólk, og at fleiri fólk fóru fyrr aftur til arbeiðis.

Skulu arbeiðsgevarar framhaldandi – og í vaksandi mun – venda sær til ALS, tá teimum tørvar nýggjar starvsfelagar, so er umráðandi, at teir hava álit á, at ALS er ført fyri at hjálpa teimum við hesum. Ein fyritreyt er, at starvsfólkini á ALS skilja tørvin hjá arbeiðsgevarum og eisini kenna viðskiftafólkini og vita, hvørji teirra eru tey røttu hjá júst hesum arbeiðsgevaranum.

Í mun til arbeiðsgevarar eru virkisvitjanir hornasteinurin at knýta sambond við teir, meðan Fjølsmiðjan er snúvningspunktið, har vit koma at kenna hini viðskiftafólkini betri.

Fjølsmiðjan fór av álvara av bakkastokki stutt eftir summarfrítíðina í 2014, og royndirnar við Fjølsmiðjuni síðani hava verið góðar. Hópin av fólki hava verið í Fjølsmiðjuni seinasta hálvtannað árið, og saman við teimum hevur tað eydnast at slóða fyri, at fleiri teirra eru farin fyrr aftur til arbeiðis.

Fram til várið 2016 helt Fjølsmiðjan til í stórum bygningi á Hjalla, men nú arbeiðsloysið av álvara er lækkað, eru seglini repað nakað, og Fjølsmiðjan er tí flutt í minni hølir í bygninginum hjá Havnar Arbeiðarafelag við Tinghúsvegin í Havn. Við flytingini eru øll starvsfólkini hjá ALS eisini savnað í sama umhvørvi í miðbýnum.

Kunningartøkni verður ein alt meiri týðandi partur av gerandisdegnum hjá starvsfólkunum á ALS, og í strembanini eftir altíð at hava tíðarhóskandi ktskipanir hevur í fleiri ár verið arbeitt við eini nýggjari fak-skipan til ALS. Nýggja skipanin var tikin í nýtslu í desember mánaði, og royndirnar higartil hava verið góðar. Skipanin er ment við nýggjastu tøkni, og hon fer við áhaldandi menning at gera arbeiðið hjá ALS bæði lættari, skjótari og tryggari enn við gomlu skipanini.

Eitt fyribrigdi, sum er vorðið serliga sjónskt nú, arbeiðsloysið er so lágt, er, at útboðið av førleikum stendur ikki mát við tørvin á førleikum. Tey fólkini, sum nú eru arbeiðsleys, hava í ov lítlan mun teir førleikar, sum arbeiðsgevarum tørvar. Tað er ein álv-

**Tal av døgum, fólk í miðal hava verið arbeiðsleys – bert tey, sum eru farin úr skipanini**




**Miðallongd á arbeiðsloysi býtt á kyn og aldursbólkar**



arsom avbjóðing, og ein avleiðing av hesum er, at hóast tað enn eru 500-600 føroyingar, sum einki arbeiði hava, so eru fleiri hundrað útlendingar komnir til Føroyar at arbeiða.

Tað er valla nøkur stutttíðarloysn á hendan trupulleikan, men týdningurin av at fólk nema sær góða útbúgving kemur týðiliga til sjóndar í hesum tíðum við lágum arbeiðsloysi, og tí eiga myndugleikarnir at taka stig til at skapa neyðugar fyritreytir og hóskandi umstøður til vaksnamannalæru, so at vaksin fólk kunnu útbúgva seg og betra um møguleikarnar at fáa eitt meiningsfult arbeiði.

Eins og undanfarin ár var 2015 eitt ár við nógvum ymiskum virksemi, har serligur dentur hevur verið lagdur á at koma í tættari samband við bæði arbeiðsgevararnar og við tey arbeiðstøku, sum leita eftir arbeiði.

Endamálið við øllum virkseminum er at stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, og at avmarka neiligu árinini, sum arbeiðsloysið hevur við sær.

Í eldhuginum eftir at sleppa at gera mun eiga vit á Arbeiðsloysisskipanini kortini altíð at hava í huga, at tað eru menniskju, vit arbeiða saman við. Menniskju, sum eru komin í tí keðiligu støðu, at tey einki arbeiði hava. Tí eiga vit altíð at vera ansin og hava virðing fyri hesum menniskjum, og tað, vit taka stig til, má geva meining – bæði fyri tey og fyri okkum á ALS. Við tí virðingini í huga eru vit sannførd um, at ALS eigur og kann gera mun, og at vit eiga at hava ein virknan leiklut í at stuðla fólki í aftur at nærkast arbeiðsmarknaðinum.

## Ársfundurin

Í mai-mánaði í 2013 var fyrsti ársfundurin eftir ein steðg síðani miðskeiðis í nítiárunum hildin. Eingin ársfundur var í 2014, men 29. mai 2015 var ársfundur aftur, og hann verður nú hildin aftur 20. mai. 2016.

Ársfundurin er at meta sum eitt slag av aðalfundi, har tey, ið varða av Arbeiðsloysisskipanini, hava høvið at kunna seg um virksemið, um støðuna og um útlitini fyri framtíðina.

## Lógarbroytingar:

Fyri millum annað at tryggja langtíðarhaldbarið hjá Arbeiðsloysisskipanini, heitti stýrið á landsstýrismannin við vinnumálum at gera ymsar broytingar í løgfrøðiligu karmunum hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Ein broyting er, at persónar, sum eftir løgtingslóg um almannapensjónir fáa hægstu fyritíðarpensjón, nú eru undantiknir frá skylduni at rinda ALS-gjald.

Ein onnur broyting er, at persónar, sum fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 17, stk. 3, í forsorgarlógini, tí tey heima uppihalda barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku, nú skulu rinda ALS-gjald av endurgjaldinum. Við hesi broyting verður hendan inntøkan nú partur av inntøkugrundarlagnum, um hesi fólk verða arbeiðsleys, og harvið verður arbeiðsloysisstuðulin tað hægri.

Tá ALS-gjaldið í 2012 varð hækkað úr einum prosenti upp í 1,25 prosent, var ásetingin av inngjaldsloftinum hon, at ALS-gjald í mesta lagi kundi vera 6.500 krónur, sum var eitt prosent av eini inntøku á 650 tús. krónur.

Tá ALS-gjaldið so varð hækkað til 1,25%, var mesta inngjaldið óbroytt 6.500 krónur, men við hesum gjørdist inngjaldsloftið 1,25% av 520 tús. krónur.

Fyri at fáa hetta í rættlag aftur, var lógin broytt soleiðis, at tryggingartakarin í mesta lagi kann rinda ALS-gjald av 650.000 krónum.

Skipanin hevur verið soleiðis, at øll hava fingið 10 bíðidagar, tá tey eru komin í skipanina. Hetta verður nú broytt soleiðis, at bíðidagarnir verða tengdir at inntøkugrundarlagnum, fólk hava havt, áðrenn tey gjørdust arbeiðsleys.

Er útrokningnargrundarlagið niðan fyri 250 tús. krónur, so verða tveir bíðidagar roknaðir, og fyri hvørjar heilar kr. 100.000 útrokningargrundarlagið hækkar, hækka bíðidagarnir við tveimum bíðidøgum. Tó til í mesta lagi 10 bíðidagar.

Við hesi broyting fáa tey við lægri inntøkum færri bíðidagar, meðan talið av bíðidøgum økist stigvíst við inntøkuni. Tað eru bert tey, sum hava eitt inntøkugrundarlag, ið er omanfyri 550 tús. krónur, sum fáa 10 bíðidagar.

Ein broyting er eisini, at persónar, sum mynstra við skipi, og mynstringin er styttri enn ein mánað, ikki fáa bíðidagar.

Í mun til karantenu er tað soleiðis, at tey, sum sjálvi siga seg úr starvi uttan haldgóða grund, og tey, sum verða burturvíst orsakað av tænastubroti, hava fingið karantenu í fýra vikur. Lógarbroytingin

**Miðallongd – kalendaradagar**




**Tal av fólkum, sum eru dottin út vegna fult dagatal**






í 2015 hevði við sær, at henda áseting varð herd, soleiðis at karantenan nú er 8 vikur.

Heimildin at áseta karantenu varð við lógarbroytingunum eisini víðkað soleiðis, at arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at luttaka í arbeiðsmarknaðarátaki ella at taka á seg arbeiði, ávíst av arbeiðsávísingini, missir rættin til arbeiðsloysisstuðul. Fyrstu ferð tann arbeiðsleysið noktar, missir hann rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, aðru ferð í 8 vikur, triðju ferð í 12 vikur og fjórðu ferð í 6 mánaðir.

Í mun til, hvussu leingi, persónur kann vera í Arbeiðsloysisskipanini og hava rætt til arbeiðsloysisstuðul, hevur verið soleiðis, at persónur kann í mesta lagi fáa arbeiðsloysisstuðul í samanlagt 648 dagar í eitt 3-ára skeið. Tað vil siga, at um persónurin hevur fingið arbeiðsloysisstuðul í samanlagt 648 dagar seinastu trý árini, fellur rætturin til útgjald burtur.

Hetta var broytt í 2015 soleiðis, at 3-ára skeiðið varð longt upp í fýra ár.

Við lógarbroytingunum í 2015 verður eitt nýtt hugtak "arbeiðsmarknaðarátøk" tikið við í lógina. Hugtakið skal skiljast í breiðari merking, og fevnir um átøk, sum ALS skipar fyri til tess betri at tryggja, at fólk, sum missa arbeiði, flyta seg sum minst burtur frá arbeiðsmarknaðinum.

Talan kann til dømis vera um førleikamennandi átøk, skeið av ymsum sløgum og starvsvenjingar hjá privatum og/ella almennum arbeiðsgevarum umframt hópin av øðrum átøkum, sum Arbeiðsloysisskipanin tekur stig til.

Persóni, sum er arbeiðstøkur, kann verða álagt at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum. Við hesum verður útvegað greið lógarheimild fyri at áleggja arbeiðsleysum skyldu at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum, og at áleggja karensdagar, um skyldan ikki verður hildin.

Umframt hesar lógarbroytingarnar, sum eru lýstar omanfyri, hevur stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina mælt landsstýrismanninum við kunngerð at gera broytingar í fiskavirkisskipanini, í skipanini við starvsvenjingum og at hækka gjøldini fyri sjálvbodnar tryggingar og tryggingar hjá sjálvstøðugum vinnurekandi.

Tað er ikki greitt, hvørt landsstýrismaðurin fer at taka tilmælini hjá stýrinum til eftirtektar, ella nær – um so verður.

### Fasti Gerðarrættur

Arbeiðsloysisskipanin hevur avtalu við Fasta Gerðarrætt at hýsa hesum stovni og at umsita ein part av hesi skipan. Fasti Gerðarrættur endurrindar Arbeiðsloysisskipanini fyri umsitingina, og í 2015 var samlaða upphæddin 67 tús. krónur.

### Trygdargrunnur fiskivinnunar

Galdandi frá 1. juli 2011 hevur Arbeiðsloysisskipanin eisini avtalu við Trygdargrunn fiskivinnunar um, at tey halda til í hølunum hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Fyri samhýsingina rindaði Trygdargrunnurin Arbeiðsloysisskipanini 1,2 mió. krónur í 2015.

Trygdargrunnurin fór í 2014 undir at endurnýggja kt-undirstøðukervið hjá grunninum. Í tí sambandi hevur Arbeiðsloysisskipanin sett fólk í starv at samskipa og stýra tí verkætlanini, og Trygdargrunnurin ber Arbeiðsloysisskipanini allar útreiðslur av hesum aftur.

Komið er á mál við fyrstu partunum av hesi kt-verkætlan, men ætlanin er at halda fram at menna kt-skipanirnar hjá Trygdargrunninum, og tí fer starvsfólkið at halda fram hjá Trygdargrunninum.

### Stýrið

Sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997, við seinni broytingum, verður stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina valt fyri fýra ár í senn.

Stýrið, sum situr nú, tók við 1. oktober 2013, og hevur verið óbroytt síðani.



### Inngjøldini hækka

ALS-gjaldið hevur verið 1,25% síðani 1. januar 2012, og síðani hevur verið ein støðugur vøkstur í samlaðu inngjøldunum hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Í 2014 vóru samlaðu inngjøldini 189,9 mió. krónur, og í 2015 komu tey upp á 202,2 mió. krónur. Ein vøkstur á 12,3 mió. krónur svarandi til 6,5%.

Hetta er tað mesta, samlaðu inngjøldini hava verið í 24-ára søguni hjá Arbeiðsloysisskipanini.

ALS-gjaldið var óbroytt í 2015, og tí stavar vøksturin í samlaðu inngjøldunum frá, at samlaðu lønarútgjaldingarnar í Føroyum hækkaðu í 2015, og frá at inngjaldshámarkið hækkaði úr 6.500 krónum upp í 8.125 krónur, sum er 1,25% av 650 tús. krónum.

Myndin niðanfyri vísir gongdina í ALS-gjaldinum og samlaðu inngjøldunum, síðani Arbeiðsloysisskipanin varð stovnað í 1992. Gula strikan vísir ALS-gjaldið, meðan stabbarnir vísa samlaðu inngjøldini.

### Útgjøldini halda á at minka

Arbeiðsloysið hevur verið støðugt minkandi síðani ársbyrjan í 2011, tá tað var upp á tað mesta í nýggjari tíð.

Samlaðu útgjøldini eru neyvt knýtt at arbeiðsloysinum, og tí eru samlaðu útgjøldini eisini minkað støðugt hesi seinastu fýra árini.

Í 2015 vóru samlaðu útgjøldini 132,8 mió. krónur, sum eru 33,2 mió. krónur minni – svarandi til sløk 20% – enn í 2014.

Aftur í 2015 eru tað serliga vanligu útgjøldini, sum eru nógv minkaði. Úr 120,8 mió. krónum í 2014 niður í 92,2 mió. krónur í 2015. Ein minking á 28,6 mió. krónur, sum svarar til 23,7%

Hinvegin hækkaðu útgjøldini umvegis fiskavirkisskipanina nakað í 2015. Í miðal vóru tað væl fleiri fólk, sum fingu útgjald um fiskavirkisskipanina í 2015, samanborið við 2014, og miðal útgjaldið til hvønn einstakan av hesum fólkunum var eisini nakað hægri. Samlaðu útgjøldini um fiskavirkisskipanina vóru 24,3 mió. krónur í 2015. Til samanberingar vóru útgjøldini 22,6 mió. krónur í 2014, og harvið var talan um eina hækking á 1,7 mió. krónur svarandi til 7,5% í 2015.

Í mun til samlaðu útgjøldini hjá Arbeiðsloysisskipanini eru útgjøldini um fiskavirkisskipanina farin úr 13,6% í 2014 upp í 18,2% í 2015.

Eisini kostnaðirnir av starvsvenjing minkaðu nógv í 2015. Úr 11,7 mió. krónum í 2014 niður í 7,5 mió. krónur í 2015. Peningaligi týdningurin fyri Arbeiðsloysisskipanina av starvsvenjingini er avmarkaður, tí upphæddirnar, sum vera goldnar út í sambandi við starvsvenjingar, høvdu óansæð verið goldnar út sum vanligur arbeiðsloysisstuðul, hevði eingin starvsvenjing verið.

Upphæddirnar, ið hava verið brúktar til arbeiðsmarknaðarátøk og førleikamenning hjá viðskiftafólkunum, hava verið vaksandi seinastu árini, og í 2014 vóru 8 mió. krónur brúktar til hesi endamál. Orsøkin er, at alsamt størri dentur verður lagdur á, at Arbeiðsloysisskipanin skal hava ein virknan lut í, at fólk fara skjótt aftur til arbeiðis, og at arbeiðsgevarar harvið fáa tey starvsfólk við røttum førleikum, sum teimum tørvar.

Sum ein avleiðing av, at talið av arbeiðsleysum nú er metlágt, hevur Arbeiðsloysisskipanin valt at avmarka vavið av arbeiðsmarknaðarátøkum nakað, og tí var upphæddin, sum var brúkt til hetta, nakað minni í 2015 samanborið við árið frammanundan. Í 2015 var samlaða upphæddin 6,5 mió. krónur.

Stórt sæð øll upphæddin fór til rakstur av Fjølsmiðjuni og tí virksemi, har er.

### Samlað útgjøld 2013 - 2015

Samlaðu útgjøldini eru býtt soleiðis seinastu árini:

| mió. krónur | 2015 | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Vanligur arbeiðsloysisstuðul | 92,7 | 120,8 | 151,7 |
| Starvsvenjing | 7,5 | 11,7 | 12,6 |
| Fiskavirkisskipanin | 24,3 | 22,6 | 24,4 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 2,3 | 2,9 | 3,4 |
| Førleikamenning og Arbeiðsmarknaðarátøk | 6,5 | 8,0 | 4,2 |
| | 133,3 | 166,0 | 196,4 |

**ALS-gjald og samlað inngjøld 1992-2015**




**Samlað útgjøld 1992-2015**



## Lønir og kostnaðir

Talið av starvsfólkum hevur verið vaksandi seinnu árini, og í miðal vóru 43 ársverk á Arbeiðsloysisskipanini í 2015. Hetta er 4 fleiri enn í 2014.

Orsøkin til, at tað nú eru fleiri starvsfólk á Arbeiðsloysisskipanini, enn tað hava verið, er hon, at framsóknin – ambitiónirnar – eru størri og øðrvísi, og at Arbeiðsloysisskipanin í enn størri mun vil stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, so at neiligu árinini av arbeiðsloysi verða so avmarkað sum yvirhøvur til ber.

Tað sæst aftur í talinum av starvsfólkum á tann hátt, at tað eru fleiri starvsfólk, sum hitta og hava samband við viðskiftafólkini, og sum saman við teimum virka fyri, at tey koma skjótari aftur til arbeiðis.

Hóast nýggja kósin, Arbeiðsloysisskipanin hevur verið á seinastu árini, krevur meiri arbeiðsorku, so hevur minkandi arbeiðsloysið tó havt við sær, at Arbeiðsloysisskipanin hevur repað seglini nakað, og í oktober mánaði var neyðugt at siga farvæl við fleiri av starvsfólkunum, samstundis sum onnur fóru at arbeiða niðursetta tíð. Við hesum er talið av ársverkum skorið nakað, og fer tað at síggjast aftur í 2016.

Hóast talið av ársverkum var fýra ársverk hægri í 2015 samanborið við árið frammanundan, so vóru samlaðu starvsfólkaútreiðslurnar ikki so nógv hægri – einans 500 tús. krónur. Í 2014 vóru samlaðu starvsfólkaútreiðslurnar 15,9 mió. krónur, og í 2015 vóru tær 16,4 mió. krónur. Íroknað í upphæddina fyri 2015 eru lønir til starvsfólkini, sum eru farin úr starvi, í uppsagnartíðarskeiðnum.

Frá 1. januar 2013 at rokna vóru roknskaparligu handfaringarnar av íløgum broyttar soleiðis, at mest sum øll keyp, sum árini frammanundan hava verið handfarin sum íløgur og avskrivað eftir fleiri árum, nú verða útreiðsluførd alt fyri eitt umvegis raksturin, og tí ber ikki einfalt til at samanbera útreiðslurnar í roknskapunum áðrenn og aftaná 2013.

Samlaðu rakstrarkostnaðirnir vóru 6,5 mió. krónur í 2015. Árið frammanundan vóru teir 9,7 mió. krónur. Sostatt er talan um eina sparing í rakstrarkostnaðunum á 2,2 mió. krónur svarandi til 23% eftir einum ári.

Verður hædd tikin fyri roknskapartøkniligu broytingunum og eingangsútreiðslum, so er tað vorðið alsamt bíligari at reka Arbeiðsloysisskipanina hesi seinastu fimm árini.

Myndin niðanfyri vísir gongdina í samlaðu fyrisitingarútreiðslunum, avskrivingunum og mvg síðani 2004. Upphæddirnar eru í føstum 2004-prísum.

Sum myndin vísir, so eru hesar útreiðslur minkaðar úr 13,6 mió. krónum í 2010 niður í 7,2 mió. krónur í 2015. Ein minking á sløk 47% eftir fimm árum.

Umroknaðar til fastar 2004-prísir eru hesar útreiðslurnar nú væl niðan fyri tað, tær vóru afturi í 2009.

Gongdin við munandi sparingum seinnu árini er úrslit av einum miðvísum arbeiði at fáa meiri fyri minni og spara allastaðni, har tað loysir seg og gevur meining. Miðað verður eftir, at hesar útreiðslur fara at minka enn meiri komandi árini, og at Arbeiðsloysisskipanin framhaldandi verður bíligari at reka.

## Ársúrslit og eginogn

Tekniska úrslitið, sum er munurin millum inntøkur og útreiðslur til arbeiðstøk, var eitt avlop á 69,4 mió. krónur. Í 2014 var talan um eitt avlop á 23,9 mió. krónur. Harvið er tekniska úrslitið batnað við 45,5 mió. krónum.

Úrslitið fyri avskrivingar og fíggjarpostar var eitt avlop á 45,5 mió. krónur. Til samanberingar var hetta úrslitið eitt hall á 1,7 mió. krónur í 2014.

Avskrivingarnar í 2015 vóru 228 tús. krónur samanborið við 2,2 mió. krónur í 2014. Í 2014 vóru allar ognir burtursæð frá grundøkinum og bygninginum við Tinghúsvegin endaliga avskrivaðar, og tá øll keyp, sum frammanundan hava verið handfarin sum íløgur og avskrivað yvir fleiri ár, nú verða útreiðsluførd yvir raksturin, so eru samlaðu avskrivingarnar minkaðar munandi. Í árunum sum



**Samlaðir rakstrarkostnaðir 2004-2015 í ársins prísum**




**Fyrisitingarútreiðslur, avskrivingar og mvg í føstum 2004-prísum**







koma, verður tað bara bygningurin við Tinghúsvegin, sum verður avskrivaður. Tær avskrivingarnar fara at verða stívliga 200 tús. krónur árliga.

Inntøkurnar frá fíggjarognunum vóru væl lakari í 2015 samanborið við undanfarna ár. Inntøkurnar gjørdust 5,2 mió. krónur í 2015 mótvegis 11,3 mió. krónum í 2014. Ein minking á 6,1 mió. krónur.

Gongdin í úrslitinum batnaði fjórða árið á rað, og gjørdist eitt avlop á 49 mió. krónur. Tað er munandi meiri enn árið fyri, men hóast tað, so skuldi úrslitið helst verið einar 5-10 mió. krónur betri, tá arbeiðsloysið er so lágt, sum tað hevur verið í 2015.

Við árslok í 2015 vóru samlaðu íløgurnar í virðisbrøv 325,8 mió. krónur, sum var 57 mió. krónur meiri enn eitt ár frammanundan.

Í 2015 er tøki peningurin minkaður úr 11,8 mió. krónum niður í 5,3 mió. krónur. Hóast minkað, er gjaldførið hjá Arbeiðsloyisskipanini gott, og minkingin er heldur at meta sum eitt tekin um, at væl verður fylgt við gjaldførinum, og at so stórur partur av tøka peninginum verður settur í virðisbrøv so skjótt, tað verður mett skilagott.

Við ársbyrjan í 2015 var eginognin 312,4 mió. krónur, og við árslok var hon vaksin upp í 361 mió. krónur.

Tá eginognin var størst, tað var í august mánaði í 2009, var hon stívliga 743 mió. krónur. Nú 6-7 ár seinni ber til at staðfesta, at hon er minkað við 382 mió. krónum. Gongdin hesi árini vísir, at tað kann vera skjótt hvønn vegin, og at eginognin og harvið fíggjarligi mátturin hjá skipanini kann vikna skjótt, og tað vísir týdningin av, at skipanin er í eini tryggari legu, so hon verður fíggjarliga haldfør nógv ár fram í tíðina.

Við gongdini, sum hevur verið á arbeiðsmarknaðinum seinastu á leið fimm árini, og við teimum tillagingum, sum eru gjørdar á Arbeiðsloysisskipanina, er neiliga gongdin vend, og skipanin vorðin betri før fyri at standa ímóti komandi bakkastum.

## Útlit fyri 2016

Tað er nógv ferð á føroyska búskapinum, og nógv virksemi er um so at siga alt landið, og arbeiðsloysið hevur verið støðugt minkandi seinastu fimm árini.

Búskaparvøksturin hevur verið óvanliga stórur, og Búskaparráðið roknar við, at vøksturin í búskapinum fer at halda fram í 2016. Gamaní ikki við somu ferð sum í 2015, men kortini trivaligur vøkstur á oman fyri 5% í ársins prísum.

Tað hevur í fleiri ár gingið serliga væl hjá alivinnuni, har prísirnir á laksi hava verið methøgir, og framleiðslan somuleiðis hevur verið stór. Føroysku alifeløgini gera nógvar stórar íløgur, sum væntandi fara at hava við sær, at tað fer at bera til at økja enn meiri um framleiðsluna við verandi aliøkjum. Hetta fer at bera til, tí við útbyggingum av smoltstøðunum fara smoltini at ganga longri á landi og vera munandi størri, tá tey fara á sjógv. Við hesum fara tey at verða styttri tíð í sjónum, og umførini á ymsu aliøkjunum fara at verða fleiri. Eisini fer styttra tíðin í sjónum at hava við sær, at vandin fyri sjúku og lús verður minni.

Ábendingar eru um, at prísirnir á laksi komandi tíðina sannlíkt fara at vera á sama høga støði, sum teir hava verið seinastu árini, og Búskaparráðið væntar, at tøkan í 2016 fer at verða á leið 5% hægri enn í 2015, og at samlaði útflutningurin verður á leið 5% hægri í 2016 samanborið við 2015.

Tað hevur eisini gingið væl hjá uppsjóvarvinnuni í fleiri ár. Uppsjóvarskipini hava havt metúrslit, og seinastu árini er vorðið meiri avleitt virksemi á landi við lutfalsliga nýggju virkjunum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri og Pelagos í Fuglafirði umframt Pelagic í Kollafirði.

### Ársúrslit 1992-2015




### Eginogn 1992-2015





Talan hevur verið um stórar íløgur á fleiri 100 mió. krónur í hesi virki, men skilst hevur tað gingið væl, og hóast kvoturnar á uppsjóvarfiskasløgunum eru nakað minni, enn tær hava verið undanfarin ár, so eru útlitini hjá hesum parti av vinnuni rættiliga góð.

Tað bragdaði eisini hjá skipunum, sum royna eftir botnfiski. Framúr fiskiskapurin á Flemish Cap er komin væl við hjá bæði línuskipunum og trolarunum, og samanlagt vóru avreiddu nøgdirnar av bæði toski, hýsu og upsa størri í 2015 enn í 2014. Samlaða avreiðingarvirðið var góðar 800 mió. krónur svarandi til á leið 20% meiri enn árið frammanundan. Hóast framgongd, so eru stovnarnir av serliga hesum trimum fiskasløgunum undir Føroyum tó sera illa fyri.

Hvussu útlitini hjá hesum partinum av flotanum eru, er torført at meta um, men seinnu árini hevur verið eitt slag av konsolidering, har fleiri skip eru løgd, og loyvini eru løgd saman á færri skip. Vónandi er tað rætt leið at ganga í mun til at fáa lønsemi aftur í heimaflotan, sum annars hevur havt stór hall heilt nógv ár á rað.

Roknað verður við, at samlaða útflutningsvirðið á botnfiski og øðrum fiskasløgum verður á leið 10% hægri í 2016 í mun til 2015.

Í byggivinnuni er úr at gera, og farið verður undir fleiri stórar verkætlanir í 2016. Marknagilsdepilin verður ikki liðugur fyrr enn í seinnu hálvu í 2017, so har verður framvegis nógv virksemi næsta hálvtannað árið. Landssjúkrahúsið skal byggjast út, Bakkafrost fer at byggja metstóra smoltstøð á Strond í Klaksvík, Bústaðir byggir nógvar bústaðareindir ymsastaðni í landinum, og nýggjur kommunskúli skal byggjast á Fløtum í Havn. Ætlanir eru eisini at byggja tjóðleikhús og musikkskúla umframt at farið er nú av álvara undir Skálafjarðartunnilin.

Stóra byggivirksemið fer sostatt at halda fram í 2016, og avbjóðingin hjá byggivinnuni verður eins og undanfarna ár at fáa starvsfólk við neyðugum førleikum. Ein avleiðing av tí verður sannlíkt, at tørvur framhaldandi verður á útlendskari arbeiðsmegi innan hesa vinnu í Føroyum – hetta hóast tað framvegis eru fleiri hundrað føroyingar, sum einki arbeiði hava. Tað vísir týdningin av at leggja dent á røttu útbúgvingarnar og førleikamenningina soleiðis, at útboðið av førleikum í størri mun stendur mát við eftirspurningin.

Oljuprísurin er nógv lækkaður í 2015, og eingin veit at siga, hvussu gongdin verður komandi árið. Ein avleiðing av lága oljuprísinum er, at virksemið í oljuvinnuni í Noreg – bæði á landi og sjógvi – er nógv minkað, og tað hevur so aftur við sær, at tað nú eru færri føroyingar, sum fara til Noregs at arbeiða í mun til undanfarin ár. Hetta sær kortini ikki út til at merkja, at hesi fólkini eru arbeiðsleys, tí tekin eru um, at tey í staðin fara til arbeiðis í Føroyum, her tað er stórur tørvur á serliga handverkarum.

Í várfrágreiðingini 2016 vísir Búskaparráðið á, at haldførið í føroyska búskapinum er ein samfelagsbúskaparlig avbjóðing. Hóast hákonjunktur og stóran búskaparvøkstur, so er framvegis hall á fíggjarlógini, og uttanlandsskuldin heldur á at vaksa. Í longdini er vandi fyri, at avbjóðingarnar verða enn størri, tí demografiska gongdin í Føroyum næstu nógvu árini boðar ikki frá góðum.

Tað verða alt fleiri eldri fólk í Føroyum, meðan talið av fólki í arbeiðsføru aldursbólkunum sannlíkt fer at minka. Framskrivingar vísa, at meðan tað nú eru 4,5 fólk í arbeiðsføra aldursbólkinum millum 16 og 66 ár fyri hvørt fólk í aldursbólkinum 67 ár og eldri, so fara tað longu í 2050 bert at verða 2,1 fólk í aldursbólkinum 16-66 ár fyri hvørt fólk í aldursbólkinum 67 ár og uppeftir. Tað verða tí óvanliga fá fólk í arbeiðsvirknum aldri.

Hendan gongdin fer at hava við sær, at trýstið á almenna geiran verður størri, og at almennu útreiðslurnar fara at vaksa, alt meðan skatta- og avgjaldsinntøkurnar hjá tí almenna sannlíkt fara at verða óbroyttar.

Neyðugt er tí við inntrivum, sum broyta hesi viðurskiftini.

Tað er neyðugt at gera tað meiri áhugavert og lokkandi hjá yngri, væl útbúnum føroyingum uttanlands at flyta aftur til Føroya at búgva, virka og menna føroyska samfelagið. Samstundis er neyðugt, at góð, viðkomandi og avbjóðandi størv eru til hesi væl útbúnu fólk. Eru tey ikki tað, verður hugurin at flyta aftur til Føroya eingin. Størvini eru ein týðandi fyritreyt fyri, at unga fólkið flytir aftur til Føroya.

Samanumtikið síggja útlitini fyri 2016 út til at vera góð. Roknað verður við framhaldandi búskaparvøkstri, og virksemið tykist fara at verða stórt komandi ár eisini.

Fer tað at bera til at fáa betri samsvar millum útboð og eftirspurning av førleikum, so at tað ikki verður neyðugt við meiri útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum, so fer arbeiðsloysið sannlíkt at verða enn lægri í 2016 í mun til 2015.

Arbeiðsloysisskipanin er styrkt, og við broytingunum, sum eru gjørdar á skipanina í seinastuni, er skipanin nú betri fyri at standa ímóti, skuldi arbeiðsloysið farið at vaksið aftur.

Tætta sambandið, Arbeiðsloysisskipanin hevur við síni viðskiftafólk, sum eru arbeiðsleys, og sum brennandi ynskja sær eitt arbeiði, eigur at halda fram og verða styrkt komandi ár, og sama við sambandinum við føroysku arbeiðsgevararnar. Tað er eisini umráðandi, at arbeiðsmarknaðarátøkini við førleikamenning halda fram og verða styrkt. Tað er ikki gott at ganga fyri einki, og tað er umráðandi, at fólk koma skjótari aftur til arbeiðis, og føroyskir arbeiðsgevarar skjótari fáa skikkaða arbeiðsmegi til tey arbeiðini, sum eru tøk.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá skipanini

Rakstrarroknskapurin fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2015 til 31. desember 2015 vísir eitt avlop á 49.025.086 krónur móti einum avlopi á 5.517.913 krónur fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2014 til 31. desember 2014.

Havandi lága arbeiðsloysið og fíggjarstøðuna hjá Arbeiðsloysisskipanini í huga, metir leiðslan ikki, at úrslitið er nøktandi. Tað skuldi helst verið 5-10 mió. krónur betri.

Gjaldførið er gott, og tøkur peningur, áogn og lætt umsetilig virðisbrøv hjá Arbeiðsloysisskipanini vuksu í 2015 við 45,6 mió. krónum úr 296,7 mió. krónum upp í 342,3 mió. krónur.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá roknskaparloki til í dag er einki hent, sum hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

## Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2015<br>DKK | 2014<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **Inngjøld** | **202.206.360** | **189.882** |
| | Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys | -132.803.946 | -165.982 |
| | Aðrir kostnaðir | -7.474.582 | -9.710 |
| | **Bruttoúrslit** | **61.927.832** | **14.190** |
| 1 | Starvsfólkaútreiðslur | -16.397.080 | -15.876 |
| 2 | Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | -227.682 | -2.161 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **45.303.070** | **-3.847** |
| | Fíggjarligar inntøkur | 5.220.967 | 11.262 |
| | **Úrslit áðrenn skatt og avgjøld** | **50.524.037** | **7.415** |
| | Skattur og avgjøld | -1.498.951 | -1.897 |
| | **Ársúrslit** | **49.025.086** | **5.518** |
| | Fluttur vinningur | 49.025.086 | 5.518 |
| | | **49.025.086** | **5.518** |



## Fíggjarstøða

**OGN**

| Nota | | 31.12.15<br>kr. | 31.12.14<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| | Grundøki og bygningar | 26.790.329 | 27.018 |
| | Rakstrartól, innbúgv og onnur støðisogn | 0 | 0 |
| 2 | **Materiell støðisogn** | **26.790.329** | **27.018** |
| | **Støðisogn tilsamans** | **26.790.329** | **27.018** |
| | Áogn av sølu og tænastum | 10.935.894 | 15.316 |
| | Onnur áogn | 622.439 | 748 |
| | **Áogn** | **11.558.333** | **16.064** |
| | **Virðisbrøv** | **325.827.590** | **268.849** |
| | **Tøkur peningur** | **5.296.818** | **11.749** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **342.682.741** | **296.662** |
| | **Ogn tilsamans** | **369.473.070** | **323.680** |

**SKYLDUR**

| Nota | | 31.12.15<br>kr. | 31.12.14<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| | Stovnsfæ | 93.840.006 | 93.840 |
| | Fluttur vinningur | 267.584.401 | 218.559 |
| 3 | **Eginogn tilsamans** | **361.424.407** | **312.399** |
| | Vøru- og tænastuskuld | 792.625 | 1.846 |
| | Onnur skuld | 7.256.038 | 9.434 |
| | **Stuttfreistað skuld** | **8.048.663** | **11.280** |
| | **Skuld tilsamans** | **8.048.663** | **11.280** |
| | **Skyldur tilsamans** | **369.473.070** | **323.680** |

4 **Eventualskyldur vm.**

# Pengastreymsuppgerð

| | 2015<br>kr. | 2014<br>t.kr. |
|---|---:|---:|
| Úrslit í tíðarskeiðnum | 49.025.086 | 5.518 |
| Avskrivingar | 227.682 | 2.161 |
| Broyting í rakstrarkapitali | 1.274.254 | -5.616 |
| **Peningastreymar frá rakstrarvirksemi** | **50.527.022** | **2.063** |
| | | |
| **Broyting í tøkum peningi** | **50.527.022** | **2.062** |
| Tøkur peningur | 11.748.679 | 7.796 |
| Virðisbrøv | 268.848.707 | 270.741 |
| Tøkur peningur 1. januar 2015 | 280.597.386 | 278.535 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2015** | **331.124.408** | **280.597** |
| | | |
| Tøkur peningur kann sundurgreinast soleiðis: | | |
| Tøkur peningur | 5.296.818 | 11.749 |
| Virðisbrøv | 325.827.590 | 268.849 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2015** | **331.124.408** | **280.597** |




# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri 2015 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í bólki C við teimum tillagingum, sum stýrið hevur mett neyðugt, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

### Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar, eins og virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skyldunum kann gerast upp álítandi.

At byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða ásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprísin og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Inngjøld

Inngjøld frá arbeiðsgevarum og løntakarum verða innroknað í rakstrarroknskapin, tá lønin, sum ALS-gjaldið verður roknað av, verður goldin. Inngjøld frá sjálvstøðugum vinnurekandi og sjálvboðin arbeiðsloysistrygging verða innroknað, tá trygging og váðaskifti er farið fram áðrenn árslok.

### Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys

Útgjøld til vanligan arbeiðsloysisstuðul, til arbeiðsloysisstuðul umvegis fiskavirkisskipanina, og til útreiðslur til starvsvenjing verða innroknaði í rakstrarroknskapinum, tá hesi eru útgoldin. Útgjøldini eru tíðargreinaði soleiðis, at tey útgjøld, ið ikki eru útgoldin áðrenn 31. desember, men eru upptjent í roknskaparárinum, eru tikin við sum skyldugur arbeiðsloysisstuðul undir skuld í fíggjarstøðuni við árslok í roknskaparárinum.

Útreiðslur til arbeiðsleys fevnir um rakstrarútreiðslur av Vakstrarhúsinum og Fjølsmiðjuni, umframt skeiðsútreiðslur til arbeiðsleys.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevnir um kostnaðir til lýsingar, umsiting, høli, innbúgv, edv, viðlíkahald, tap uppá skuldarar v.m. Harumframt verða vanligar íløgur t.d. í rakstrartól og innbúgv útreiðsluførd, sum aðrir uttanhýsis kostnaðir.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um løn og samsýning umframt lønartengdar kostnaðir.

### Av- og niðurskrivingar

Av- og niðurskrivingar eru ársins av- og niðurskrivingar upp á materiella støðisogn.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teirri upphædd, sum viðvíkur roknskaparárinum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentuinntøkur og -kostnaðir.

### Skattur og avgjøld

Skattur og avgjøld fevnir um meirvirðisgjald, ið stavar frá keypi av vørum og tænastum.

Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er Arbeiðsloysisskipanin undantikin skattskyldu.

## FÍGGJARSTØÐAN

### Materiell støðisogn

Grundøki og bygningar verða virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið

beinleiðis eru knýttir at útveganini og til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini og restvirðum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 50 ár | 32 % |

Vinningur ella tap í sambandi við sølu av materiellari støðisogn verða gjørd upp sum munurin millum søluupphæddina, við frádrátti av sølukostnaði, og roknskaparliga virðið av støðisognini søludagin. Vinningur ella tap verða innroknað undir avskrivingar í rakstrarroknskapinum.

## Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum tapum.

## Virðisbrøv og kapitalpartar

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknað undir ogn í umferð, verða virðisásett til dagsvirði (børskursin) við roknskaparlok. Dagsvirðið verður ásett út frá seinast skrásetta sølukursinum.

## Skuld

Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

## Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin vísir peningastreymar grunsins í árinum býtt á økini rakstrarvirksemi, íløguvirksemi og fíggjarvirksemi og broytingar í tøkum peningi í árinum umframt tøka pening grunsins við ársbyrjan og ársenda.

## Peningastreymur frá rakstrarvirksemi

Peningastreymurin frá rakstrarvirkseminum verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarupphæddir og broytingar í arbeiðskapitali. Arbeiðskapitalurin fevnir um ogn í umferð frádrigið stuttfreistaða skuld og tær upphæddir, sum eru partur av tøka peninginum.

## Peningastreymur frá íløguvirksemi

Peningastreymurin frá íløguvirkseminum fevnir um gjøld í sambandi við keyp ella sølu av feløgum og virksemi umframt keyp ella sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn.

## Peningastreymur frá fíggjarvirksemi

Peningastreymurin frá fíggjarvirkseminum fevnir um broytingar í støðd ella samanseting av stovnsfæi grunsins og kostnaðum knýttir at hesum umframt upptøku av lánum og gjaldan av avdráttum.

## Tøkur peningur

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv, sum uttan forðing kunnu umbýtast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er uttan týdning.

| | 2015 kr. | 2014 t.kr. |
|---|---|---|
| **1. Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| Lønir | 14.139.549 | 13.568 |
| Eftirlønartryggingar | 1.581.339 | 1.571 |
| Almenn gjøld | 537.767 | 575 |
| Onnur lønartengd gjøld | 138.425 | 162 |
| | **16.397.080** | **15.876** |

Umframt starvsfólkaútreiðslurnar omanfyri er starvsfólkakostnaður eisini innroknaður, sum partur av útreiðslum til arbeiðsleys. Hesin kostnaður er í sambandi við Fjølsmiðjuna og Vakstrarhúsið og var fyri 2015 til samans 2.917 tkr. í mun til 1.498 tkr. í 2014.

Av hesum er samsýning til stjórn og stýrið:

| | 2015 kr. | 2014 t.kr. |
|---|---|---|
| Stjórn og stýrið | 1.143.613 | 1.070 |
| | **1.143.613** | **1.070** |
| Miðaltal av starvsfólkum | 43 | 39 |

## 2. Materiell støðisogn

| Upphædd í kr. | Grundøki og bygningar | Rakstrargøgn innbúgv og onnur støðisogn | Til samans |
|---|---|---|---|
| Keypsvirði við ársbyrjan 1. januar 2015 | 28.672.623 | 17.392.984 | 46.065.607 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 0 |
| Keypsvirði við árslok 31. desember 2015 | 28.672.623 | 17.392.984 | 46.065.607 |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan 1. januar 2015 | 1.654.612 | 17.392.984 | 19.047.596 |
| Avskrivingar í árinum | 227.682 | 0 | 227.682 |
| Av- og niðurskrivingar við árslok 31. desember 2015 | 1.882.294 | 17.392.984 | 19.275.278 |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2015** | **26.790.329** | **0** | **26.790.329** |

## 3. Eginogn

| Upphædd í kr. | Stovnsfæ | Flutt vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan 1. januar 2015 | 93.840.006 | 218.559.315 | 312.399.321 |
| Ársúrslit | 0 | 49.025.086 | 49.025.086 |
| **Eginogn 31. desember 2015** | **93.840.006** | **267.584.401** | **361.424.407** |

## 4. Eventualskyldur v.m.

Kærunevndin fyri Arbeiðsloysisskipanina hevur í avgerð í desember 2015 staðfest, at ALS ikki hevur heimild at taka ímóti ALS-gjøldum av øðrum enn A-inntøku.

Henda avgerð kann hava við sær, at Arbeiðsloysisskipanin kemur í ta støðu, har hon skal rinda ein part av móttiknum ALS-gjøldum aftur.

Grunnurin hevur ein leigusáttmála, har leiguskyldan í uppsagnartíðini er 0,6 mió. kr.

